# Lív í Jólagøtuni

**Lív er aftur í ár vertur í jólakalendaranum hjá SVF, og skal tí aftur venja seg við, at fólk kenna hana aftur á gøtuni**

Lív Kjeld gjørdist eitt kent andlit í Føroyum, tá hon var vertur í jólakalendaranum hjá SvF í desember í fjør, Jólagidd. Í ár er hon aftur vertur í sjónvarpsjólakalendaranum, sum hesuferð eitur Jólagøtan.

Lív sigur, at hon er eitt sindur spent, men eisini eitt sindur fjálturstungin, nú Føroya fólk fyrstu ferð sleppur at síggja ársins jólakalendara.

Jólagøtan er nærum liðugt upptikin, og 400-600 fólk hava luttikið í hesi stóru verkætlan, ið m.a. umfatar at gera sjálva Jólagøtuna.

Lív hevur verið partur av arbeiðinum síðan í summar. Tí er hon so langt inni í hesum heiminum, at hon onga fatan hevur av, hvussu sendingin hevur eydnast. Men so skjótt, sum fyrsti partur hevur verið í sjónvarpinum, koma afturmeldingarnar.

Lív heldur, at tað hevur verið stuttligt at luttikið í allari gongdini í ár. Í fjør kom hon til eina klára sending og var bara vertur í henni. Men hesuferð slapp hon at koma við hugskotum, og at verða eftirspurd frá byrjanini. Tað eru Páll og Eir, ið hava skrivað Jólagøtuna, og tey hava verið ótrúliga fitt og stuttlig at arbeiða saman við.

Tá Lív var vertur í Jólagidd, upplivdi hon ofta, at fólk steðgaðu henni, og børn róptu eftir henni, tað var ótrúliga løgið. Men nú er so langt fráliðið, at nú er tað næstan eingin, sum kennir hana longur. Men hetta verður væntandi at broyta seg nú.

Lív heldur sjónvarpið vera ein spennandi miðil, sum hon fegin hevði vilja arbeitt meira í, um hon fær høvið til tess.




























